# Jann Ingi livir í landsliðsvónini

*Nú varð eg ikki úttikin til venjingarleguna, tí eg skal spæla í 2. deild. Men eg ætli mær at stríðast fyri at gerast betri fótbóltsspælari, staðfestir Jann Ingi Petersen*



**Og Julian Johnsson sigur seg avgjørt rokna við, at landsliðsvenjarin fer at senda boð eftir honum, hóast hann er farin úr toppliði í Íslandi og at vera spælandi venjari í næstbestu deildini í Føroyum**

**BROYTTAR FYRITREYTIR**

*Jóannes Hansen*

Teir hava dystast um sama plássið, og tað er komið fyri, at tann eldri og royndi hevur verið noyddur at seta seg á beinkin, tí venjarin metti yngra mannin at vera betri skikkaðan at vera millum teir fyrstu ellivu. Men nú er langt síðani, at hetta var soleiðis. Eldri maðurin hevur sum oftast verið frammanfyri tann yngra.

Nú eru teir fastir fúsir á sama miðvølli. Talan er um heilt annan miðvøll enn tann, sum teir hava kappast um pláss á. Broytingin hevur verið stór, og fyritreytirnar fyri landsliðssessi verða ivaleyst mettar at vera versnaðar hjá teimum báðum. Men tað er framvegis møguleiki fyri, at teir aftur fara at stríðast um eitt og sama miðvallarpláss.

Tað eru Julian Johnsson og Jann Ingi Petersen, sum tað her er talan um. Nú spæla teir báðir við B68 í næstbestu deildini. Julian Johnsson er spælandi venjari. Hann flutti um ársskiftið úr Akranesi, har hann seinastu árini hevur verið við í stríði um íslendska meistaraskapin, og til Toftir, har setningurin er at fáa B68 spælararnar at stríðast fyri at endurvinna sessin í bestu deildini, sum teir mistu í fjør.

Millum undirsáttarnar og liðfelagarnar er Jann Ingi Petersen. Í fyrraárið royndi hann seg fyrstu ferð á landsliðnum, og higartil hevur hann spælt tíggju dystir. Tá ið hann stríddi seg inn á liðið í 2003, fekk hann miðvallarplássið, sum Julian Johnsson í fleiri ár hevði so at siga havt patent uppá. Julian varð settur á beinkin, og ikki minst í undankappingardystinum í Íslandi í 2003 mundi tað svíða hjá veteraninum, sum eftir steðgin á Laugardalsvøllinum varð setur á vøllin fyri Jann Inga.

Á heysti í 2003 fór Jann Ingi til Fremad Amager í næstbestu donsku deildini. Vónin var har at vinna fast pláss á miðvøllinum, og dreymurin var at gerast fulltíðar yrkisspælari. Í viðførinum vóru eitt nú landsdystirnir, sum eru nevndir omanfyri. Men tað royndist einki serligt. Jann Ingi var ikki so ofta millum teir fyrstu ellivu, og eftir summarsteðgin hevði serliga óheppin eygnaskaði við sær, at tað ikki bar honum til at venja og spæla. Nakað undan ársskiftinum varð tað ament, at Jann Ingi aftur skuldi spæla við B68.

At dreymurin um landsliðsfótbólt er vorðin kámari, eftir at hann er fluttur til felag í 2. deild, hevur Jann Ingi longu kent.

- Tá ið landsliðið fór á venjingarlegu í Spania, varð eg ikki úttikin. Eg fekk frá venjaranum at vita, at orsøkirnar vóru tær, at eg ikki hevði spælt í heyst, og so at eg nú skuldi spæla í einum felag í 2. deild í Føroyum, sigur Jann Ingi Petersen.

*Men hevði tú ikki roknað við, at 2. deildar fótbóltur í Føroyum fór at hava við sær, at vánirnar fyri landsliðsfótbólti fóru at minka?*

- Tað lá ikki fremst í huganum, tá ið eg gjørdi av aftur at flyta til B68. Tað taldi mest at fáa gleðina og trygdina við at spæla fótbólt og í gerandisdegnum aftur. Eg eri fegin um at spæla við síðuna av Juliani Johnsson á B68 miðvøllinum. Honum læri eg støðugt nógv av, og eg rokni við, at innihaldið í gerandisdeginum, sum handverkslæruplássið og kenda umhvørvið bera við sær, fara at skunda undir fótbóltsmenningina.

*Roknar tú framvegis við at fáa landsliðsboð?*

- Tíðin á liðnum minkaði nógv í fjør. Eg spældi allar 90 minuttirnar 1. juni, tá ið vit taptu 3-0 móti Hollandi. Venjarin segði eftir tann dystin, at hann var nøgdur við avrikið hjá mær, so tað ber til at siga, at eg spældi meg ikki av. Síðani var eg á beinkinum uttan at sleppa upp í part. Nú varð eg ikki úttikin til venjingarleguna, tí eg skal spæla í 2. deild. Men eg ætli mær at stríðast fyri at gerast betri fótbóltsspælari, og um tað fer at eydnast, so verður tað upp til venjaran at gera av, um tað verður nóg gott til landsliðsúttøku ella ikki.

*Hvussu ofta venja tit í B68, tá ið sammett verður við Fremad Amager?*

- Í Fremad Amager vandu vit eina ferð hvønn dag. Tað hava vit eisini gjørt í B68 undan kappingarbyrjan. Tá ið vit fara at spæla í landskappingini hvørt vikuskifti, fara vit at venja fýra ferðir um vikuna.

## Eyðmýkt er lyklaorðið

Julian Johnsson, sum síðani 1995 hevur verið 60 ferðir á landsliðnum og er tann spælarin, ið hevur verið triði oftast á landsliðnum, sigur seg ongar ætlanir hava um at sleppa landsliðnum. Og hann roknar seg sjálvan ikki at vera verri fyri til altjóða avbjóðingarnar, enn hann hevur verið.

- Drívmegin hjá mær í fótbóltinum hevur altíð verið at vinna, og tað er hon framvegis. Nú havi eg leiklutin sum spælandi venjari. Eg eri venjari, men eg eri eisini spælari. Tað vil siga, at eg venji saman við øllum hinum. Eg havi givið spælarunum boð um, at eg eri spælari á sama støði sum teir, og at eg á ongan hátt vil hava, at teir spara meg, og tað havi eg longu kent, at teir ikki ætla sær at gera.

*Heldur tú, at vánirnar fyri landsliðssessi eru eins góðar nú, sum tær hava verið, tá ið tú hevur verið fulltíðar yrkisspælari?*

**Framhald á síðu 8...**